# Vit sóknast eftir einum búskaparløgfrøðingi



*Vit økja um virksemi fyri at náa málinum at skapa vøkstur og avkast til íleggjararnar. Í hesum sambandi sóknast vit eftir einum búskaparløgfrøðingi.*
*Í fjør vóru vit skrásett á VMF/ICEX og í ár hava útbyggingarnar av oljuleiðunum á enskum øki tikið dik á seg. Hesar uppgávur seta stór krøv til okkum, og tú hevur nú møguleikan at vera við til at loysa hesar uppgávur.*

### Vit bjóða

- Eitt starv í einum altjóða umhvørvi
- Eitt starv, tú hevur stóra ávirkan á
- Eitt starv í góðum óformligum umhvørvi
- Eitt starv, ið gevur tær møguleikar at arbeiða breitt bæði við fíggjarligum og løgfrøðiligum spurningum
- Eitt starv í einum spennandi felag sum gongur undan og mennist skjótt
- Eitt starv við stórum yrkisligum og persónligum avbjóðingum
- Løn samsvarandi útbúgving og royndum

### Løgfrøðiligi parturin fatar í høvuðsheitum um hesar uppgávur

Sum skrásett felag er Atlantic Petroleum umfatað av nógvum føroyskum og altjóða lógum og reglum. Tú fert at taka lut í at tryggja, at hesar lógir og reglur verða fylgdar, at joint venture-avtalur við onnur oljufeløg verða hildnar og at rættindini hjá Atlantic Petroleum í nýggjum avtalum verða tryggjað. Tú skalt eisini gera kunningartilfar til leiðslu og nevnd um týðandi løgfrøðilig viðurskifti.

### Fíggjarligi parturin fatar í høvuðsheitum um hesar uppgávur

At gera greiningar myndla og fíggjarligar greiningar av íløgunum hjá felagnum. Kunningartilfar til leiðslu og nevnd av fíggjarligu gongdini, og at gera rakstrarætlanir og forsagnir fyri felagið.

### Tú skal helst

- Vera útbúgvin cand merc. jur ella samsvarandi, ella við at gerast liðug/ur við útbúgvingina
- Hava hug til at ganga undan og royna nýggjar leiðir
- Vera fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- Duga at arbeiða sjálvstøðugt og í toymum
- Duga føroyskt og enskt í skrift og talu

### Umsókn

Vinarliga send okkum umsókn tína í seinasta lagi hin 1. august 2006 á teldupostadressuna petroleum@petroleum.fo, ella til Atlantic Petroleum, Postsmoga 1228, FO-110 Tórshavn.

Meiri fast at vita um starvið við at venda sær til Wilhelm Petersen stjóra á tlf. 350100 wilhelmp@petroleum.fo ella til Teit Samuelsen, fíggjarleiðara tlf. 350100 teiturs@petroleum.fo

Atlantic Petroleum
www.petroleum.fo

Stephanssons Hús 314291




# Starvsfólk
TIL PERLUNA Í SMS

### Fulla tíð og aftaná skúlatíð

Søkt verður eftir fólki M/K í aldrinum 16-30 ár til fulltíðarstarv og at arbeiða aftaná skúlatíð - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær...



Send umsóknina til:
Perlan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.

Perlan

